## City fram við Liverpool

Ein dystur var í Premier League í gjár. Á Britannia Stadium tók Stoke í móti Manchester City. Dysturin endaði við javnleiki 1-1. Stutt eftir at seinni hálvleikur var byrjaður fekk Stoke Abdoulaye Faye útvístan. Hóast ein mann í undirtal, so eydnaðist tað Glenn Whelan at leggja vertirnar á odda. Fimm minuttir fyri tíð, javnaði Gareth Barry fyri Manchester City, til endaliga støðuna 1-1. Stoke fekk eitt mál í yvirtíðini kolldømt. Manchester City hevur við stignum í dag yvirhálað Liverpool á fjórða plássinum. Teir hava nú 45 stig fyri 25 dystir, meðan Liverpool á fimta plássi hevur 44 stig fyri 26 dystir. Manchester City og Liverpool møtast sunnudagin á City of Manchester Stadium.



## Holst skjótt tøkur

Seinastu vikurnar hevur landsliðsmaðurin drigist við skaða í legginum, men væntandi byrjar hann at venja í hesi vikuni. Við donsku heimasíðuna, bold.dk, sigur Christian Lamhauge Holst, at hann í løtuni roynir at vera varin við skaðanum. - Eg royndi at renna í farnu viku, men eg merkti alt fyri eitt, at beinið ikki var heilt til reiðar. So í samráð við heilsusektorin hjá okkum, havi eg valt at taka tað róligt. Men eg rokni við, at eg fari undir veruliga venjing í hesi vikuni, sigur Holst við heimasíðuna. Christian Lamhauge Holst hevur skotið fimm mál fyri Silkeborg hetta kappingarárið.

# Prokop einki batnaður

**Hóast eysturríkski venjarin, Gunnar Prokop, hevur karantenu í eitt ár, royndi hann leygardagin undir dysti í Viborg at ávirka avgerðir á bonkinum við bæði sms-boðum og telefonsamrøðum**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Leygardagin gjørdi danska kvinnuhondbóltsliðið, Viborg HK, eitt rættiliga gott hál, tá tað eydnaðist at vinna heili 35-26 á eysturríkska stórfelagnum, Hypo-Niederösterreich. Men mitt í sigursrúsinum vóru danskarar eisini í øðini inn á ein av áskoðarunum, sum – vilja teir vera við – breyt fleiri forboð undir sjálvum dystinum.

Talan er um 69 ára gamla Gunnar Prokop, sum í áravís hevur vant Hypo-Niederösterreich, men í løtuni hevur karantenu í eitt ár frá venjaragerninginum. Tað merkir millum annað, at hann slett ikki hevur loyvi til at hava samband við liðið áðrenn ella undir dysti.

Kortini vildu fleiri sjónarváttar vera við, at hann í hálvleikinum ringdi til venjaran og annars undir sjálvum dystinum umvegis dóttir sína sendi hópin av sms-boðum til liðleiðaran, sum so aftur bar venjaranum boðini frá »skuggavenjaranum«, ið upprunaliga sat á sjeyndu stólarøð, men fleiri ferðir gekk og mól aðrastaðni í høllini.



Gunnar Prokop á veg út úr høllini í Viborg leygardagin, eftir at kvinnulið hansara, Hypo-Niederösterreich, hevði tapt við níggju málum fyri Viborg HK

Mynd: Claus Bonnerup/Polfoto

### Hava sagt EHF frá

– Fleiri sóu sms-boðini, dóttirin skrivaði og sendi undir dystinum. Og eg veit, at í hálvleikinum hevði Gunnar Prokop beinleiðis samband við umklæðingarrúmið, sigur stjórin í Viborg HK, Peter Cassøe, við donsku sjónvarpsrásina, TV 2. Tí hevur danska felagið vent sær til europeisku hondbóltssamgonguna, EHF, fyri at kæra atburðin hjá Prokop.

– Vit hava skrivað til EHF og sagt teimum frá tí, vit upplivdu í sambandi við dystin. Vit hava bara stutt greitt frá, hvussu hann bar seg at, og so má tað vera upp til EHF at taka avgerð um, hvat skal henda víðari, sigur Cassøe.

At danska felagið fer víðari við málinum, undrar neyvan nakran, tí tá Gunnar Prokop í heyst fekk fyrst eina revsing og síðani fekk hana linkaða munandi, vóru fleiri donsk feløg á gosi og mótmæltu, tí Prokop so mangan hevur verið í vási og er ikki akkurát kendur sum nakar verji hjá røttum ítróttaranda.

### Ongan ítróttaranda

Sjálvur sigur Gunnar Prokop seg ikki leggja petti í, hvat Viborg HK ger, tí hann heldur seg vera stak illa viðfarnan í Viborg, sum hann sigur hava ússaligastu viðhaldsfólkini í øllum Europa. Leygardagin slapp hann ikki oman á vøllin, tá dysturin var liðugur, og tað østi hann seg um aftaná.

– Vanliga er tað eingin trupulleiki hjá mær at sita millum áskoðararnar, men undir hesum umstøðunum og í hesi høllini, sum er á tremur við teimum viðhaldsfólkunum, ið hava vánaligasta ítróttarandan í Europa, er tað veruliga ein roynd, sigur Prokop.

Hóast Prokop sat á sjeyndu stólarøð, so funnu fjepparnarnir hjá Viborg HK skjótt útav, hvør hann var. Sambært Ritzau-tíðindastovuna varð dúgliga ýlt og rópt eftir Prokop, tá hann eftir dystin var á veg út úr høllini.

## FAKTA

Gunnar Prokop hevur sum forseti og venjari í eysturríkska felagnum, Hypo Niederösterreich, sett síni meira og minni ivasomu fingramerki á europeiskan kvinnuhondbólt í tvey áratíggju. Hann er ikki akkurát kendur sum tann venjarin, ið hámetir rættan ítróttaranda, og í einum Champions League-dysti tann 29. oktober í fjør millum Hypo Niederösterreich og franska felagið, Metz, var støðan 27-27, tá Metz fór í skjótálop í síðstu sekundunum og hevði møguleika at avgera dystin. Men Prokop leyp bara sjálvur inn á vøllin og takláði ein Metz-spælara, so einki spurdist burturúr – annað enn, at hann fekk reyða kortið og at Metz ikki megnaði at fáa nakað burtur úr sínum fríkasti, tá bara fýra sekund vóru eftir á klokkuni. Dysturin endaði sostatt við javnleiki, og aftaná segði Gunnar Prokop, at hann var noyddur at taka kjansin fyri at fáa reytt kort, um tað kundi forða fyri tapi, samstundis sum hann vardi hann gerð við, at hann gjørdi tað einasta, sum var taktiskt rætt at gera í støðuni. Europeiska hondbóltssamgongan, EHF, gjørdi í fyrsta umfari av, at Gunnar Prokop skuldi fáa karantenu frá europeiskum hondbólti í trý ár, umframt at hann skuldi útihýsast fyri lívið í øllum nevndum undir EHF. Men seinni var revsingin linkað munandi, so karantenan bara gjørdist eitt ár, umframt at útihýsingin úr EHF-nevndararbeiði var fullkomuliga strikað. Upprunaliga bótin upp á 340.000 krónur, hann persónliga skuldi gjalda, var sett niður í 75.000 krónur, og felag hansara, Hypo Niederösterreich, slapp heilt undan at rinda sína bót, sum var upp á 225.000 krónur. Einasti partur av revsingini, ið stóð eftir uttan broyting, var stigið, sum Hypo Niederösterreich misti, hóast dysturin endaði við javnleiki 27-27. Men tað var nú heldur eingin verulig revsing, tí tá bólkaspælið í Champions League var av, gjørdi hetta eina stigið hvørki til ella frá. Seinni skal Gunnar Prokop hava sagt, at hann iðrar seg um gerðina og hevur leitað sær hjálp frá sálarfrøðingi.

